# Rr Umrøðuevni




**Seyður**
Hugt verður at ymiskum seyðasløgum. Tosað verður um munin á føroyskum og øðrum. Gamli føroyski seyðurin. Hugt verður at myndum í bókum.

Hvussu eitur ymiskt í sambandi við seyð? t.d.litir, kollutur, hyrntur... Her kann lærarin spyrja serkøn ella fáa serkøn inn í flokkin at siga frá.



## Harumframt

**Seyður**
Børnini gera stóra mynd av seyði úr ymsum tilfari, s.s. pappíri, tógvi, ull. Tey skriva við hjálp frá læraranum heiti á kropspørtum og seta tey rundan um myndina.
Farið verður við børnunum á fjall.

**Frá lívi til matna**
Hvat kann nýtast á seyði? Til hvat?

**Uppskrift til blóðmør**
Tilfar:
1 litur av blóði
500 gr. putursukur
500 gr. havragrýn
rosinur eftir ynski
tálg eftir ynski; matsúrepli kunnu nýtast
2 tsk. salt
1 tsk. kanel
1 tsk. nelikar
1/2 tsk. pipar

Skræð ella klipp vombina í 4 indur.
Seyma indrini so langt, at passaligt op er at fylla í.
Rør alt tilfarið saman. Indrini verða fylt 3/4, og opið verður seymað aftur. Pylsupinnar ella kjøtspritur kunnu nýtast.
Blóðmørurin skal kókast í uml. 1 tíma. Her er neyðugt at stinga í indrini við stokki at vita, um kókað er.